Góðu útoyggjafólk og góðu stevnugestir!

Tað er fallið mær í lut at seta hesa 15'andu Útoyggjastevnuna, sum á triðja sinni er í Hesti.
Fari at takka Útoyggjafelagnum hjartaliga fyri at hava sýnt mær heiðurin at seta stevnuna.

Eg má viðganga, at hetta er fyrstu ferð eg eri í Hesti. Eg havi glett meg til dagin, og her er eisini fantastiska vakurt. Tað rennur mær til hugs orðini hjá Fríðriki Petersen:

"Mítt føðiland tað er ei stórt sum onnur lond
men so væl hevur Gud tað gjørt við síni hond"

Hesi orð eru sjón fyri søgn í dag. Útoyggjafelagið hevur veruliga gingið á odda at skapt áhuga og ans fyri smáplássum og víst á, hvønn dýrgrip, vit í veruleikanum hava fingið at liva í.
Tað er ikki øllum beskorið so stóra vøggugáva.

Útoyggjafelagið, sum upprunaliga spratt úr arbeiðinum við útoyggjaálitinum frá apríl 2001, hevur dugað at samsjóða sjónarmiðini hjá útoyggjunum og ikki minst duga at sett útoyggjarnar á dagsskrá og víst møguleikar og gongdar leiðir. So kann onkur siga, hvat er komið burtur úr, ella er nokk komið burtur úr. Her er vert at leggja áherðslu á, at Útoyggjafelagið er ein týðandi táttur í samstarvinum millum útoyggjafólk og er ein felags rødd fyri áhugamálum tykkara í samfelagnum. Endamálið við øllum arbeiðinum hjá felagnum er at skapa framburð, trivnað og økt vinnuvirksemi á útoyggj. Eg meti, at Útoyggjafelagið hevur fingið nógv av skafti hesi árini, tað hevur virkað.

Umframt at samansjóða tey, sum búgva á útoyggj og geva høvi at koma saman eins og at umboða útoyggjafólk, kann eg eisini nevna hetta tiltakið, sum í dag verður hildið í Hesti - Útoyggjastevnan, sum er eitt sera gott høvi til at seta fokus á útoyggjarnar; teirra møguleikar, avbjóðingar og ynskir. Harumframt er hetta eitt gilt høvi at vísa, hvat tit kunnu bjóða okkum øðrum.

Útoyggjafelagið hevur eisini verið sera virkið í sambandi við fleiri verkætlanir. Eg kann nevna:

- Framleiðsluhús á útoyggj
- Nordic Delight
- Mentanarsøgulig landsløg
- Slowfood í Føroyum
- Economuseé
- "Løggildur hjallur" og mangt annað.

Flestu av hesum verkætlanum hava fingið stuðul av játtanini til útoyggjamenning.
Endamálið við játtanini er at stuðla tiltøkum, sum eru mennandi fyri útoyggjar. Stuðulin kann veitast einstaklingum, virkjum, feløgum, og kommunum.

Í ár komu 21 umsóknir um stuðul fyri uml. 3 mió. kr., men stuðulsjáttanin er bert 710 tús. kr. So her er nakað hjá okkum at hyggja nærri at. Við avmarkaðari játtan varð ikki møguligt at veita øllum umsóknum stuðul. Men tað koma at verða framdar ymiskar spennandi ætlanir kring oyggjarnar aftur í ár.

Tað er ongantíð meira neyðugt við Útoyggjafelagnum enn nú, og ongantíð hevur verið meira neyðugt at varpa ljós á umstøðurnar hjá fólkunum, sum búgva har. Samfelagið er nógv broytt, og hugburðurin er eisini broyttur.

Vit hava altíð umrøtt okkum sjálvi sum oyggjafólk, men hetta tykist vera við at fara. Ein oyggjaflokkur - og oyggjar eins og systrar, allar lið um lið, sigur skaldið. Míni tulking av hesum hevur altíð ligið nakað solidariskt við at vera í flokki ella í familju. Nakað man er góður við og vil gera sítt til, fyri at hjálpa. Men hetta tykist broytt. Meira og meira bæði tosa og agera vit, sum um Føroyar er ein býur.

Samfelagsbroytingin, sum hevur havt við sær, at fólk alsamt meira og meira hava valt býirnar, og størri og størri partar av landinum nú eisini verða samanbundnir. Samanbinding onkrastaðni tykist at skapa fjarstøðu aðrastaðni.

Nú komi eg sjálv av oyggj. Ikki tí, at Suðuroyggin er lítil og kann sammetast við tær avbjóðingar, sum smæstu oyggjarnar hava, men fjarstøðan er har. Fyri at vera her í dag, mátti eg t.d fara heimanífrá í gjár. Men tað sum eg kenni aftur og eri stúrin um, er hugburðurin, sum eg til tíðir møti, tá ið eg umrøði avbjóðingar í útjaðarinum. Sigur man eitt einasta orð um, at tað til tíðir kann vera trupult, er ikki altíð nakað forstáilsi at finna, men heldur hinvegin eitt standardsvar, sum at tit hava sjálvi valt at búgva har, so tit hava onki at brokka tykkum um. Hetta svar skulu vit ikki góðtaka, men áhaldandi vísa á okkara rætt til at vera til á jøvnum føti við aðrar borgarar. Endamálið má vera, at til ber at liva, virka og skapa sær eydnuna kring landið alt.

Føroyingar hava í øldir bygt okkara land upp til tað, tað er í dag. Tað eru tó glottar at hóma. Frá at vit so at siga í stóran mun hava flutt okkum frá náttúruni inni býir og inn í hús at liva, so upplivið eg, at fleiri og fleiri yngri fólk fáa eyguni upp fyri ríkidøminum í bygdalívinum. Eisini ynski um eitt lív nærri náttúruni og í meira burðardyggum høpi tykist vinna frama, og tað er gleðiligt. Tað má vera okkara uppgáva í politisku skipanini at virka fyri, at møguleikarnar verða til tess.

Eisini alskurin til okkara mentanararv, sum í stóran mun finst á smáplássunum - tað at veita náttúru- og mentanarupplivingar til bæði ferðafólk og okkum sjálvi, er í menning. So eg havi góðar vónir fyri framtíðina. Tað fer nokk at koma eitt mótrák ímóti býarlívi, strongd og forbrúki, til nærveru við náttúruna, burðardygd og tættari relatiónir i familjulívi.

Eg havi havt ta gleði at fundast við Útoyggjafelagið. Tað er ein sjálvsama konstruktivur og positivur andi yvir tykkara arbeiði. Eg gleði meg at samstarva nærri við tykkum um eitt nú burðardygga ferðavinnu, náttúruvernd, grøna orku, Ramsar, fyrstuhjálp og onnur umráði, tit tóku upp, sum er partur av okkara málsøki. So her er nógv gott at byggja á.

Á útoyggj verður strembað eftir, at ferðavinnan verður burðardygg og umhvørvisvinarlig. Ferðavinna á útoyggj merkir økt inntøka hjá tykkum, sum búgva her og stuðlar undir økismenningina. Men økt virksemi á útoyggj merkir eisini økt trýst á umhvørvið og friðin, sum vit og onnur ferðafólk vilja finna og uppliva. Tí er neyðugt at leggja seg eftir at reka burðardygga ferðavinnu; at taka atlit til plantu- og djóralív, at vísa fram staðbundna mentan og bjóða staðbundnan mat. Stutt sagt, at tryggja, at tað serstaka verður varðveitt. Verður tað burtur, verður partur av Føroyum og okkara samleika burtur. Tí hvat hava vit tá at vísa fram.

Tá ið vit komu í land her í dag, togaði dóttirin Ásgerð, sum er 9 ár, í meg. Hon las á einum stórum skilti. "Útoyggjarnar eru tað, sum restin av Føroyum hevur mist". Tað gjørdi inntrykk á hana og eisini á meg. Tí tann dag, vit hava mist so stóran part av okkara samleika burtur, tá hava vit mist okkum sjálvi burtur.

Tá sviar hyggja eftir "Smak av Färöarna" ella danir síggja "Det færøske spisekammer" og fáa hug at koma hendan vegin, ella aðrir útlendingar lata seg freista av hugtøkum, sum "untoched", "unspolid" "unbelievable", er ein stórur partur av upplivingarpakkanum útoyggjarnar. Tá flestu av okkum føroyingum síggja hetta sama, er tað eisini útoyggjarnar, sum renna fram fyri okkum. Tí mugu vit fara væl um og minna onnur á at gera tað sama.

Vit hava eitt nútíðarhóskandi og sera framkomið heilsuverk í Føroyum, og arbeitt verður áhaldandi við at betra um umstøðurnar innan heilsuøkið. Mítt ynski er at tryggja borgarar á útoyggjunum í enn størri mun. Seinasta árið hava vit gjørt sáttmála við Atlantic Airways, sum tryggjar eina góða tænastu, tá talan er um sjúkraflutning. Atlantic Airways hevur keypt tvær nýggjar tyrlur, ið báðar kunnu nýtast til sjúkraflutning. Allur bráðfeingis sjúkraflutningur til og frá útoyggj skal tí framyvir gerast við tyrlu, um veðrið ikki forðar hesum. Atlantic Airways upplýsir í hesum sambandi, at í miðal ganga umleið 15 minuttir, til flogið verður og 33 minuttir, til komið er á staðið. Tvs. í vanligum føri tekur ein bráðfeingis flutningur av útoyggj við tyrlu umleið 45 minuttir ella undir ein tíma.

Eisini verður í løtuni arbeitt við at leggja lunnar undir eina nýggja skipan við sokallaðum "first respondarum" – vit mangla enn eitt føroyskt heiti. Ein "first respondari" hevur servitan innan bráðfeingis sjúkrarøkt og hevur eisini atgongd til eina tasku við hjartastartara, ilt og alskins aðrari útgerð, ið kann nýtast til bráðfeingis sjúkrarøkt á staðnum. Talan verður um persón, ið býr á oynni, ið vanliga uppiheldur sær á oynni, og sum hevur staðið eitt góðkent "first responadaskeið". Hendan skipanin fer í enn størri mun at tryggja borgarar á útoyggj, bæði tá talan er um trygdarkenslu og eisini beinleiðis í sambandi við sjúku ella vanlukku. Við hesi skipan kann ein "first responadi" viðgera ein sjúkling, til tyrla er á staðnum. Í síðsta enda kann hendan skipanina bjarga lív. Mítt ynski er soleiðis, at vit skjótast gjørligt kunnu fara undir arbeiðið við eini "first respondara skipan", so borgarin á útoyggj kann føla seg enn tryggari.

Fyri borgaran á útoyggj man gerandisdagurin og gerandislívið vera tað týdningarmiklasta. Tí mugu vit alla tíðina hava tað fyri eygað at betra um umstøðurnar fyri fólkið at liva og virka á staðnum. Vinnu og samferðslumøguleikar eru avgerandi í hesum høpi. Útoyggjarnar mugu ikki enda við bert at vera ferðavinnumál, men vit skulu hava ein livandi útjaðara, har fólk kunnu trívast. Her skulu vit lurtað eftir tykkum í Útoyggjafelagum, sum kenna livikor og umstøður so væl og í felag abeiða við at skapa batar. Um hetta ikki verður gjørt, verða vit munin fátækari og saga greinina av, sum vit sjálvi sita á; tá nærkast Føroyar at verða ein býur og ikki eitt oyggjaland. Tá hava vit søplað burtur úr goymslum stóran mentanararv og virðir - alt tað, sum ger Føroyar serstakt, og sum ættarlið undan okkum hava bygt upp og latið okkum upp í hendi.

Við orðunum hjá Gulakki Jacobsen fari eg at lýsa útoyggjastevnuna 2016 setta

"Bið gott fyri fólki av fornari ætt,
sum Gud hevur givið so dýran ein skatt;
at liva við friði í Føroyum"